## Útflyta meiri

Teir báðar fyrstu mánaðarnar í ár útfluttu norðmenn fiskavørur fyri tvær mia. norskar krónur meiri enn í somu mánaðum í 2006, og tað er ein vøkstur upp á heili 20 prosent. Eitt nú seldu norðmenn væl meiri klippfisk, soleiðis at klippfiskasølan kom upp í næstan 700 mió. norskar krónur í januar og februar. Tað mesta fór til Brasil. Men ES er nógv tann størsti fiskamarknaðurin hjá norðmonnum og keypti fyri 3,5 mia. krónur í januar og februar.

## Fleiri vindmyllur

Í Danmark hevur Orkustýrið gjørt av, at 98 stórar vindmyllur kunnu setast upp á Horns Rev uttan fyri Esbjerg. Orkustýrið sigur, at myllurnar kunnu nøkta tann árliga elorkutørvin hjá umleið 200.000 húsarhaldum, og tað svarar til umleið tvey prosent av donsku nýtsluni. Tær 98 vindmyllurnar fara at kosta millum 2,5 og tríggjar mia. krónur, men verkætlanin verður ikki sett í verk, fyrr enn tær neyðugu góðkenningarnar eru fingnar til vega.

## Truplari at síggja reyð tøl



*Tað eru serliga tey stóru feløgini, P/F Føroya Fiskavirking og P/F Kósin, sum »hála« í skeiva endan í greiningini yvir fiskavirkini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Tað gongur framá í føroysku fiskavirkisvinnuni, men langt er á mál, og nógv skal til, áðrenn stóra hallið í 2004 og 2005 upp á meira enn 40 miljónir krónur verður vent til avlop**

FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Í greiningini, sum grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe hava gjørt yvir gongdina hjá einum stórum parti av føroysku fiskavirkjunum árini 2001-2005, sæst, at einki av hesum virkjum hevði hall í 2001.

Í 2001 vóru 18 virkir við í greiningini, og av teimum rindaðu 8 skatt, meðan 10 høvdu avlop. Einki av virkjunum hevði hall.

Í 2002 var samlaða talið av virkjum 19. Av hesum rindaðu 8 skatt, 10 høvdu avlop, og eitt av virkjunum hevði hall.

Í 2003 broyttist gongdin til tað verra. Tá rindaðu 6 virkir skatt, 7 høvdu avlop og 4 høvdu hall.

Í 2004 gekst uppaftur verri í fiskavirkisvinnuni. Hetta árið rindaðu bert 3 av 12 virkjum skatt, 3 høvdu avlop og 6 høvdu hall.

Árið 2005 var kanska eitt lítið vet frægari, um hugt verður at niðastu linjuni í roknskapunum. Tá rindaðu 3 virki skatt, 4 høvdu avlop og 5 høvdu hall.

Talan er um 9 feløg, sum vóru við í greiningini hjá Rasmussen & Weihe fyri 2005, men nøkur av hesum feløgum eiga fleiri fiskavirki.

Hesi 9 feløgini, har P/F Føroya Fiskavirking er hitt størsta og P/F Kósin hitt næst størsta, keyptu og virkaðu tilsamans 78,6% av tí ráfiski, sum kom til virkingar í Føroyum í 2005. Av hesum stóð Føroya Fiskavirking fyri meira enn helminginum av ráfiskinum, 52,6% og Kósin fyri 14,1%.

Tað er heldur eingin loyna, at tað serliga eru hesi bæði feløgini, sum eiga sín stóra lut í hallinum hjá fiskavirkisvinnuni í 2005 og 2004.

Í greiningini hjá Rasmussen & Weihe sæst, at tey tilsamans 9 feløgini høvdu eitt samlað hall í 2005 og 2004 upp á meira enn 40 miljónir krónur.

Sum vit nevndu omanfyri, góvu 5 av hesum 9 virkjunum hall, 4 høvdu avlop og 3 rindaðu skatt í 2005, sum var eitt heldur frægari ár enn 2004.

Líkt er til, at nøkur av hesum virkjum hava havt eitt heldur frægari úrslit í 2006 enn í 2005, men greiningin yvir 2006 verður ikki liðug fyrr enn til heystar – og vit hava higartil ikki verið úti og leitað eftir neyvu úrslitunum hjá hesum virkjum fyri farna ár.

Nú feløg í fiskavirkisvinnuni hava keypt sær skip, serliga P/F Kósin og P/F Faroe Seafood, er spurningurin, hvussu roknskapirnir fyri 2006 verða at lesa. Men væntandi er tó, at skipini vera rikin serskild í øðrum feløgunum ella dóttirfeløgum.

# Tavan í Leirvík

**Seinastu trý árini hevur Tavan í Leirvík havt eitt samlað avlop eftir skatt upp á tilsamans 12,5 miljónir krónur. Sosialurin hevur spurt stjóran, Jóan Magnus Rasmussen, hvat tey á Tavuni duga, sum aðrir ikki duga, nú fleiri fiskavirki hava havt velduga stór hall seinastu árini**



FISKAVIRKINI
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Jóan Magnus Rasmussen er ikki maðurin við teimum stóru orðunum. Hetta er ein hábærsligur maður, sum heldur sigur eitt orð ov lítið enn eitt orð ov nógv. Rørslurnar við skrivaraborðið ella frameftir gólvinum eru lagaligar, og vinnuligu hugskotini er gjøgnumhugsað. Hann veipar ikki um seg við ørmunum, rópar ikki, men dugir avbera væl at fáa tað besta burtur úr teimum, hann samstarvar við – og ikki minst sínum arbeiðsfólki, ið eru krumptappurin aftanfyri alt virksemið á Tavuni.

Saman við Ingvari Joensen, sum var maðurin, ið slóðaði fyri og øðrum góðum fólkum, bæði kvinnum og monnum, hava teir dugað at rikið gulllaksa- og upsavirkið í Leirvík við avlopi, meðan mong onnur fiskavirki um landið hava havt stór hall.



*- Nei, eg trúgvi ikki, at vit duga nakað, sum aðrir ikki duga. Eg havi varhugan av, at virkini kring landið sum heild hava dugnalig fólk, bæði í leiðslu og á gólvinum, sigur Jóan Magnus Rasmussen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Avlop í rakstri

Í 2004 og 2005, tá ávikavist 6 og 5 virkir av 12 annars høvdu hall, hevði Tavan í 2004 eitt avlop eftir skatt upp á 1,6 miljónir krónur – og í 2005 var avlopið eftir skatt 3,4 miljónir krónur.

Árið 2006 var tað besta hjá virkinum nakrantíð, og tá vit spyrja Jóan Magnus, hvussu hetta árið hildnaðist, hveppur hann seg eitt lítið sindur við at siga okkum talið, men sigur so lítillátin, at hetta árið var avlopið heilar 7,5 miljónir krónur.

Spurdur, hvat tað er, sum hann og Ingvar saman við sínum arbeiðsfólki duga, ið aðrir ikki duga, sigur hann enn meira lítillátin:

- Nei, eg trúgvi ikki, at vit duga nakað, sum aðrir ikki duga. Eg havi varhugan av, at virkini kring landið sum heild hava dugnalig fólk, bæði í leiðslu og á gólvinum.

### Tungt við upsa

Hann vísir á, at tað er ógvuliga tungt við upsanum, men á Tavuni hava tey fingið tað at borið til, soleiðis at upsaframleiðslan eisini gevur avlop.

- Vit hava tann fyrimun,